# AVTALU TOTAL



*Arbeiðið uppá bygningarnar, sum skulu hýsa meira enn 800 arbeiðarum, er farið í gongd og hevur Føroya Tele fingið uppgávuna at veita telesamband millum hetta byggiprojektið í Hetlandi og høvuðstøðina í Aberdeen.*

***Páll Vesturbú, stjóri í FT Net hevur alla orsøk til at vera fegin og nøgdur, nú tað hevur eydnast Føroya Tele at fáa enn ein bein innanfyri gáttina á risastórum altjóða oljufelag***

***Mynd Jan Müller***

## FT eisini hjálpa BT og Hetlandi

Hetlendingar eru sera ónøgdir við stóra bretska televeitaran British Telecom, sum teir halda ikki ger nokk fyri at betra um teletænastur og breiðband í Hetlandi. Teir halda, at fyritøkan hugsar meira um størri býirnar inni á meginlandinum og hevur rætt og slætt slept útjaðaranum í Stórabretlandi upp á fjall. Hetta gav at býta herfyri, tá toran slóð niður í eina millumstøð hjá BT og hetlendingar mistu alt internetsamband í fleiri dagar. Hetta merktu hetlendingar væl, her ikki minst handilslívið. Fólk fingu ikki tikið teirra pensiónir út osfr.

Hetta vilja hetlendingar hava bøtt um, og røddir hava verið frammi um at fáa tættari samstarv við Føroya Tele. Nú hevur Shetland Telecom, sum Shetland Island Council hevur stovnað, gjørt av at leggja ein kaðal frá Lerwick til kaðalstøðina hjá Føroya Tele úti við strondina, har Shefakaðalin kemur í land í Hetlandi. Hetta verður gjørt soleiðis, at serstakliga vinnulívið í Lerwick kann gera brúk av Shefakaðalinum. Tá kaðalin er lagdur verður so gjørd avtala við Føroya Tele at knýta landkaðalin í Shefakaðalstøðina hjá FT.